## Ike er í Hollandi



Tað vóru fleiri, sum bitu merki í, at nigerianski áleyparin hjá NSÍ, Ike-chukwu Onyema, ikki var á liðnum, sum mánadagin tapti 3-1 fyri HB í Gundadali.

Hetta setti eisini beinan vegin ferð á søgurnar um, at spælarin skuldi verið rýmdur frá NSÍ, ella at felagið skuldi hava uppsagt sáttmálan, men hesum tíðindum er so einki hald í, verður sagt úr Runavík.

- Tað er soleiðis, at nigerianska U-21 landsliðið tekur lut í eini kapping í Hollandi í næstum. Tí eru vit biðin um at frígeva Ike til hesar uppgávur, og tí kunnu vit ikki nokta fyri.

Soleiðis sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ, og hóast tað sjálvandi er ein missur, tá ein vanliga fastur spælari verður burturfrá, so er ikki so nógv at gera við hetta, staðfestir venjarin.

Hvussu leinki NSÍ má vera spælarin fyriuttan, er ikki greitt, men tað verður í øllum førum fram til 18. juni.

- Nú veldst sjálvandi um, hvussu liðið stendur seg. Verða teir slignir út í bólkaspælinum, verður Ike væntandi aftur tann 18. juni. Koma teir hinvegin allan vegin til finaluna, so er hann burtur til 2. juli, upplýsir NSÍ-venjarin.

-jm

# Toftamenn halda stílinum

**Heldur ikki hetta vikuskiftið læt B68 mál fara ígjøgnum. Og bæði sandoyingar og vágamenn royna at halda stutt tjóður í oddafiskinum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*



*HB helt javnleikinum í nærum 80 minuttir, men seinastu løtuna skrædnaði, tá B71 skoraði ikki færri enn fýra ferðir*

Tað tykist ikki vera nakar, sum skalar toftamenn í stríðnum um at vinna uppflyting til bestu deildina. Fjórða umfarið á rað vunnu toftamenn, og fjórða umfarið á rað var sigurin somikið sannførandi, at mótstøðuliðið ikki megnaði at skora.

Hesaferð settu vertirnir ferð á alt fyri eitt, og longu eftir 20 minuttum stóð 3-0 á máltalvuni, og síðani varð bara ein vegur.

Toftamenn hava nú 12 stig fyri fýra dystir, og málmunurin er ikki minni enn 19-0. Av sonnum tøl, sum kunnu ræða mótstøðuliðini, ið nú standa fyri framman.

### B71 og FSV elta oddin

Sandoyingar og vágamenn tykjast í løtuni vera teir, sum kunnu bjóða B68.

B71 hevði vitjan av HB hetta vikuskiftið, og hóast tað leingi leikaði javnt á, so endaði alt við tryggum heimasigri. B71 hevði eftir steðgin - tá vindurin var undan - nógv spæl og hópin av møguleikum, men teir máttu bíða til seinastu 10 minuttirnar, áðrenn gongd kom á málskjótingina. Tá fekk Tummas Pauli Olsen (kanska heppið) sneitt bóltinum í málið, tá Tróndur Vatnhamar í HB-málinum roknaði við innleggi. HB hevði rimmar møguleika at javna stutt eftir, og iðranin um hetta gjørdist ikki minin, tá Clayton Soares í næsta álopinum økti um leiðsluna. So var liðugt hjá HB, og við einum máli frá Eli Hentze og eini sannari perlu frá Magnus Olsen slerdu sandoyingarnir sigurin rimmarfastan.

Í Sandavági vitjaði GÍ, og heldur ikki hesaferð fingu gøtumenn nakað stig. Munurin á liðnum var snøgt sagt alt ov stórur til, at nakar sum helst spenningur skuldi verða um útfallið, og við tveimum hat-trickum frá Birgir Joensen og Sonna Johansen vunnu vertirnir ein tryggan sigur.

### AB hongur í

Á Argjum hava tey aftur í ár vónir um at verða partur av oddastríðnum í deildini. Teir høvdu um vikuskiftið truplan dyst móti Royn í Hvalba, og tað mundi lætta um heimferðina, at teir fingu trý stig í skjáttuna.

Tað stóð tó nógv á, og fyrra partin av dystinum var Royn eins væl við í dystinum, sum gestirnir vóru tað. AB fekk tó hol á, tá Hans Jørgen Djurhuus skoraði, og so kundi Súni Fríði Barbá enn einaferð prógva, at hann framvegis dugir kynstrið at standa á rætta stað til røttu tíðina.

Seinasti dysturin var í Havn, har LÍF vitjaði. B36 hevur í ár havt tað sera tungt, og heldur ikki hesaferð fingu teir nakað burturúr dystinum. 0-4 var úrslitið av dystinum, sum sendi LÍF upp á miðjuna á talvuni.

Komandi vikuskiftið skal B36 á vitjan í Gøtu, og tann uppgerðin líkist einum slagi um, hvørt tað verða B36 ella GÍ, sum skal hanga fast í botninum.

Eisini tykist talan gerast um áhugaverdar uppgerðir, tá B68 vitjar hjá AB og tá FSV04 kemur í Gundadal at spæla móti HB.

**Úrslit:**

**B68-Sumba 7-0 (5-0)**
1-0: Jóhan Petur Poulsen
2-0: Arnbjørn Danielsen
3-0: Jóhan Petur Poulsen
4-0: Jóhan Petur Poulsen
5-0: Øssur Jacobsen
6-0: Julian Johnsson
7-0: Ovi Magnussen

**B71-HB 4-0 (0-0)**
1-0: Tummas Pauli Olsen
2-0: Clayton Soares
3-0: Eli Hentze
4-0: Magnus Olsen

**FSV04-GÍ 6-0 (4-0:**
1-0: Sonni Johansen
2-0: Sonni Johansen
3-0: Birgir Joensen
4-0: Sonni Johansen
5-0: Birgir Joensen
6-0: Birgir Joensen

**Royn-AB 0-2 (0-0)**
0-1: Hans Jørgen Djurhjuus
0-2: Súni Fríði Barbá

**B36-LÍF 0-4**
Eingin dómaraseðil komin til FSF

# Írski hópurin

Írski landsliðsvenjarin, Brian Kerr, hevur tikið út hópin til HM-undandystin móti Føroyum.

Og líkt er ikki til, at avboð nøkrum slag hótta írska hópin, sum soleiðis verður tann sterkasti hugsandi á føroyaferðini.

Nøvn sum Roy Keana úr Manchester United, Damien Duff úr Chelsea, Robbie Keane úr Tottenham og Shay Given úr Newcastle teljast millum kendastu nøvndini í hópinum. Samlaði hópurin er annars hesin: Given (Newcastle United FC), Kenny (Sheffield United FC), Murphy (West Bromwich Albion FC), Carr (Newcastle United FC), Breen (Sunderland AFC), Harte (Levante UD), Finnan (Liverpool FC), O´Brien (Newcastle United FC), Cunningham (Birmingham City FC), O´Shea (Manchester United FC), Maybury (Leicester City FC), Miller (Manchester United FC), Roy Keane (Manchester United FC), Holland (Charlton Athletic FC), A Reid (Tottenham Hotspur FC), S Reid (Blackburn Rovers FC), Quinn (Sheffield United FC), Kilbane (Everton FC), Kavanagh (Wigan Athletic FC), Duff (Chelsea FC), Robbie Keane (Tottenham Hotspur FC), Elliott (Sunderland AFC), Doherty (Norwich City FC), Morrison (Birmingham City FC).

-jm

### Støðan, 2. deild menn

| | dystir | v | j | t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 4 | 4 | 0 | 0 | 19 | 0 | 19 | 12 |
| 2 B71 | 4 | 3 | 0 | 1 | 13 | 4 | 9 | 9 |
| 3 FSV04 | 4 | 3 | 0 | 1 | 10 | 1 | 9 | 9 |
| 4 AB | 4 | 2 | 1 | 1 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 5 HB | 4 | 2 | 0 | 2 | 12 | 10 | 2 | 6 |
| 6 LÍF | 4 | 2 | 0 | 2 | 12 | 11 | 1 | 6 |
| 7 Royn | 4 | 2 | 0 | 2 | 3 | 11 | -8 | 6 |
| 8 Sumba | 4 | 1 | 0 | 3 | 13 | 22 | -9 | 3 |
| 9 B36 | 4 | 0 | 1 | 3 | 4 | 10 | -6 | 1 |
| 10 GÍ | 4 | 0 | 0 | 4 | 5 | 24 | -19 | 0 |

### Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | B71 | 6 |
| Sonni Johansen | FSV04 | 6 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 5 |
| Súni Frí_i Barbá | AB | 4 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 4 |
| Ovi Magnussen | B68 | 4 |
| Uni Arge | HB | 4 |
| Jóan Pauli Olsen | Sumba | 4 |
| Rene Thomsen | Sumba | 4 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 3 |
| Eli Hentze | B71 | 3 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 3 |
| Dánjal Pauli Dalbø | GÍ | 3 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 3 |

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo